## Kári um at seta prísin

Eg geri ikki virðið á einum málningi upp eftir, hvussu nógva tíð, eg havi brúkt upp á hann, tí tað kann vera sera ymiskt, og so verða fólk helst eitt sindur forvirrað, um eitt lítið malarí kostar nógv meira enn eitt stórt. Tí seti eg vanliga prísin eftir støddini av málninginum.



## Kári um tónleik

Tónleikur er jú næstan sum at mála – bara við nótum – og mær dámar væl at koyra tónleik hart frá, tá ið eg máli. Við hvørt vil eg gjarna hava frið, men til aðrar tíðir verður tónleikurin drønaður frá. Eg lurti eftir ymiskum tónleiki, men ofta er tað jazztónleikur, sum verður koyrdur frá.

# At mála er sum

**- Við hvørt komi eg væl upplagdur her um morgnarnar og eri klárur at mála, men eg fái einki burturúr. Aðrar dagar gongur tað sera væl. At mála er sum at fara á flot. Tú veitst ongantíð, hvat tú fært heimaftur við tær, sigur listamálarin Kári Svensson, sum hevur bygt sær atelier á Velbastað. Har er útsýnið framúr gott, men Kári vil ikki hava vindeygu í sínum atelieri**



### Samrøða



**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo

- Eg kann ikki hava vindeygu í atelierinum.

Kári Svensson stendur mitt inn í tí stóra bygninginum, hann hevur bygt við síðuna av húsunum hjá sær á Velbastað. Hølini eru stór og ljós, og stórir og smáir málningar standa upp móti veggunum í rúminum. Summir teirra eru júst lidnir, aðrir mangla seinastu strokini, og onkrir hava staðið lidnir í eina tíð.

- Eg havi vindeygu í takinum, so at eg fái dagsljós úr eystri, og har niðri í horninum eru tvey vindeygu, men har havi eg altíð persiennur fyri.

- Útsýnið her á Velbastað er so stórsligið, at tað hevði als ikki borið til hjá mær at mála her, um eg hevði eina flotta útsikt. Tað hevði blivið til ov nógv inntrykk, og tað hevði órógvað meg, sigur Kári Svensson.

Hann býr í Havn, men bygdi sær fyri hálvum triðja ári síðani hús og atelier á Velbastað, og har arbeiðir hann nú við sínari list.

- Tað hevur verið mín dreymur í eini 20 ella 30 ár at fáa eitt slíkt atelier. Tá ið tú ikki hevur títt egna, veist tú ongantíð heilt, hvar tú flýtur, og tað hava verið nógvar flytingar gjøgnum árini. Onkrastaðni havi eg ongan hita havt, so her eru umstøðurnar heilt øðrvísi, sigur Kári Svensson og viðurkennir, at atelierið hjá honum eisini er ein staðfesting av, at hann er blivin meira etableraður sum listamaður.

### Øll kalla seg listafólk

53 ára gamli Kári Svensson byrjaði sum heilt ungur at mála, og hann var bert 16 ára gamal, tá ið hann hevði sínar fyrstu málningar við á eini framsýning. Síðani er nógv vatn runnið í ánni, og tað eru liðin eini 16 ár, síðani Kári gjørdist listamálari burturav.

- Eg havi viljað hetta allatíðina, men tað er ein long og strævin tíð at fara ígjøgnum, áðrenn tú heldur, at tú ert komin nakran veg sum málari og kanst fara at kalla teg listamálara.

- Í dag eru orð sum listaverk, listamaður og listaframsýning